# Opið stríð um pensiónsveitingar

**Ymsar fatanir av lógini um fyritíðarpensionistar hevur volt til ósemju millum tingmann Tjóðveldisfloksins, Finn Helmsdal, og landsstýrismann Javnaðarfloksins í almanna- og heilsumálum, Hans Paula Strøm. Málið varð viðgjørt í tinginum mikudagin**

PENSIÓNSMÁL
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*




*Ósemja hevur tikið seg upp millum Hans Paula Strøm, landsstýrismann, og Finn Helmsdal, løgtingsmann, um praktiseringina av pensiónslógini. Finnur finnist at skerjingum í veitingunum hjá fyritíðarpensionistum, meðan Hans Pauli sigur seg noyðast at halda seg til lógina*

Ósemja hevur tikið seg upp um pensiónsupphæddina hjá fyritíðarpensionistum, tvs. hjá borgarum, sum av eini ella aðrari orsøk ikki eru arbeiðsførir og tí eru vorðnir pensionistar áðrenn vanligan pensiónsaldur.

### Snýttir pensionistar

Tingmaður Tjóðveldisfloksins, Finnur Helmsdal, setti fyri stuttum landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum, Hans Paula Strøm úr Javaðarflokkinum, ein skrivligan fyrispurning, og undir orðaskifti í tinginum seinnapartin mikudagin svaraði landsstýrismaðurin fyrispurninginum frá tingmanninum.

Talan er um eitt fløkt mál, men orsøkin til ósemjuna í málinum er, at Finnur metir fyritíðarpensionistar hava verið fyri órætti orsakað av skeivum tulkingum av pensiónslógini. Fyritíðarpensionistarnir fáa eina skiftisupphædd á 10272 krónur um árið. Hetta tí teirra pensión minkaði við somu upphædd, tá pensiónslógirnar vórðu broyttar 1. januar 2000. Við lóg er ásett, at grundupphæddin hækkar við fýra prosentum um árið (regulering), men kjarnin í málinum tykist vera, at myndugleikarnir samstundis hava minkað skiftisupphæddina samsvarandi, og tí er talan ikki um nakran reellan bata fyri teir fyritíðarpensionistarnar, sum Finnur spyr um. Við øðrum orðum verður ein upphædd økt (grundupphæddin), men sama krónutal verður tikin av aftur á aðrari veiting (skiftisupphædd), sum fer til somu fólk. Hesum vil Finnur ikki finna seg í, og hann hartar nú landsstýrismannin fyri at praktisera lógina á henda hátt.

– Lógin varð gjørd fyri at betra um sømdirnar hjá ávísum fyritíðarpensionistum, og eyka skiftisupphæddin varð samtykt við tí endamáli at minka um ávísar óhepnar avleiðingar. Men nú verður skiftisupphæddin skerd, so hvørt sum grundupphæddin hækkar, og so er talan jú ikki um nakran bata, sigur Finnur Helmsdal.

### Embætisverkið

Tingmaður Tjóðveldisfloksins var í trivnaðarnevndini sjálvur ein av arkitektunum handan lógina, tá Tjóðveldisflokkurin sat í samgongu, og hann sigur, at skerjingin í skiftisupphæddini hjá fyritíðarpensionistum er í stríð við andan og endamálið hjá teimum, sum tá smíðaðu lógina. Hann krevur nú svar frá avvarðandi landsstýrismanni um, hví skiftisupphæddin verður skerd, so illa støddu fyritíðarpensiónistarnir ikka fáa nakran samlaðan vinning.

– Orsøkin til misskiljingina er, at embætisverkið hevur tulkað lógina á ein hátt, sum bert ger sømdirnar verri hjá avvarðandi at hesi lóg. Hetta er eitt gott dømi um, hvussu ein landsstýrismaður er í lummanum á embætisfólki hansara. Tað skal sigast, at lógin er ógreið, men vit hava nú undirstrikað, hvat ætlanin var við lógini, tá vit evnaðu hana til, og núverandi støða stríðir ímóti øllum sannføringum og sjónarmiðum um avlamispensionistar. Tá endamálið við øllum er, at upphæddin fyri fyritíðarpensionistar skal hækka við fýra prosentum um árið, kann tað ikki vera rætt, at myndugleikarnir taka tilsvarandi upphædd frá teimum á viðbótini (skiftisupphæddini), sigur Finnur Helmsdal.

### Greið lóg

Mikudagin seinnapartin fekk Finnur svar frá landsstýrismanninum Hans Paula Strøm, og hann sigur, at talan als ikki er um nakra ósemju.

– Vit eru báðir samdir um, at reformar eiga at verða gjørdir á økinum, og eg eri prinsipielt ímóti, at peningur til fyritíðarpensionistar verður skerdur. Men samstundis havi eg eina greiða lóg at halda meg til, sum tíverri sigur, at skiftisupphæddin skal skerjast, so hvørt sum grundupphæddin hækkar. Eitt stórt embætisverk við fleiri instansum hevur hugt at lógini, og hana má eg fyrihalda meg til, so leingi broytingar ikki eru farnar fram, sigur Hans Pauli Strøm. Landsstýrismaðurin sigur, at talan er um eitt stórmál, tí nógvir føroyingar eru umfataðir av lógini, og reformar á økinum fara at kosta tíggjutals milliónir.

Landsstýrismaðurin metir tað vera løgið, at Finnur og onnur einki hava gjørt við trupulleikan øll tey árini, teir sótu í samgongu, og tað, hann nú kemur og sigur, er júst tað, Hans Pauli og hini í andstøðuni vístu á í undanfarnu fullveldissamgongu.

– Teir hava samtykt eina lóg, sum eg nú má halda meg til, og hvat teir hava ætlað og havt til endamáls, kann eg ikki nýta til nakað, so leingi lógin talar greitt, slær landsstýrismaðurin fast.

Men Hans Pauli Strøm leggur til endan afturat, at hann í framtíðini ætlar sær at fremja broytingar á økinum, so áðurnevndu trupulleikar verða rættaðir.

## Sjálvinnskriving hjá Atlantsflogi

### Atlantsflog bjóðar nú ferðafólki sínum sjálvvirkandi innskriving í Kastrup

Ferðafólk hjá Atlantsflogi, sum ferðast um floghavnina í Kastrup, kunnu nú skriva seg sjálv inn í innskrivingarmaskinunum, sum standa yvir av skrivstovuni hjá felagnum í Temrinal 2 í Kastrup, sigur Atlantsflog í tíðindaskrivi.

Hetta fer at spara ferðafólki væl av tíð í mun til gomlu skipanina, har standast skuldi í bíðirað, viðhvørt rættiliga leingi, áðrenn avgreiðslan var fingin frá hondini.

Nú klara fólk sjálv innskrivingina upp á einar tveir tríggjar minuttir, og kunnu so fara víðari.

Hendan tænasta gongur eisini ynski frá fleiri og fleiri ferðafólkum á møti, sigur Kent Christensen, sølu- og marknaðarleiðari hjá Atlantsflog í tíðindaskrivinum.

**ej**